## Var nóg gomul

Altjóða Olympiska nevndin sigur nú, at einki hald var í tosinum um, at kinverska fimleikagentan, He Kexin, ikki var nóg gomul, tá hon vann gull á leikunum í summar. Aldursmarkið fyri at taka lut í OL er 16 ár, og frá fleiri síðum varð ført fram, at Ke Hexin ikki leyk hesa treyt. Málið er nú kanna, og altjoða Olympiska nevndin sigur seg hava fingið haldgóð prógv fyri, at Kexin – eins og fýra aðrar kvinnur undir illgruna – var nóg gomul til at taka lut á leikunum.



## Henke heldur fram

Líkt er til, 37 ára gamli svenski fótbóltsspælarin Henke Larsson heldur fram at spæla fyri Helsingborg. Felagið váttar, at tey eru í samráðingum við Henke um at leingja sáttmálan, sum gongur út í ár. Annars hava tíðindi verið frammi um, at feløg í Onglandi hava verið áhuga í gera sáttmála við veteranin, sum áður hevur spælt fyri feløg sum Celtic, Barcelona og Manchester United.

# Gunnar endurvann FM í fjallasúkkling

**Um vikuskiftið skipaði Tórshavnar Súkklufelag fyri FM í MTB, fjallasúkkling. Eins og í fjør, bleiv koyrt uppi við vakra økið kring Studentaskúlan í Hoydølum.**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*



*Kappast varð eisini millum børn, og hesi koyrdu á, so skjótt sum startskotið hevði ljóðað*
*Mynd: Høgni R. Øster*

Kappingin var ein sokallað MTB Criterium kapping. Hetta merkir at kappast verður á fjallasúkklu á einum lítlum strekki. Hesa ferð bleiv kappast í 45 minuttir, og so skuldu súkklararnir út á enn eitt umfar.

Danin Kasper Legård luttók á fyrsta sinni í kapping í Føroyum, og menn vóru spentir hvussu sterkur hesin súkklari var. Tíðliga í kappingini løgdu Høgni Øster og Gunnar seg á odda. Men á triðja umgangi dragnaði millum Høgna og Gunnar, og hálvan tíma seinni kundi Gunnar koyra ein tryggan sigur í hús.

Kári Simonsen var vælkoyrandi og megnaði hann at koma triðjur á mál.

Gunnar Dahl-Olsen gjørdist eisini FM vinnari í fjør, og megnaði hann tí at endurvinna kappingina aftur í ár.

### Børn sluppu eisini at royna seg

Børnini kappast í trimum bólkum, og kappst verður millum gentir og dreingir. Sera spennandi var millum børnini, og serliga var tað um 2. plássið millum dreingir í bólki III. Jóanis Albert Nielsen vann tryggan sigur, men spenningingurin um hvør gjørdist næstur øktist sum kappingin leið. Hjørtur Ellingsgaard lá leingi á øðrum plássi, men Hjørtur Poulsen minkaði um munin fyri hvønn umgang. Hesin bólkur skuldi súkkkla átta umfør, og í síðsta umfari megnaði Hjørtur Poulsen at súkkla seg fram um Hjørtur Ellingsgaard, sum mátti taka til takkar við einum triðja plássi.

Eisini í bólki II var spenningur. Leingi lá Fríði Fríðmundsson á tryggur fremst, men Jóhannes Jóannesson var vælkoyrandi og nærkaðist í stórum Fríða, men Fríði helt tørn og vann, men bert 4 sekund vóru millum Fríða og Jóannes. Ein sera spennandi kapping.

Kappingin var væleydnað og veðrið av tí besta at kappast, og tí hevði heilt fitt av súkklarum og áskoðarum leitað sær niðan til Hoydalar at fylgja við hvussu leikur fór.

## ÚRSLIT

**FM í fjallasúkkling**

1 Gunnar Dahl-Olsen
Høgni Øster
Kári Simonsen
Evald Rasmussen
Kasper Legård
6 Janus Hofgaard

**Bólkur I:** *børn yngri enn 9 ár:*
Bartal Dam Gregoriussen
Poul Jóhan á Torvlaðnum

**Bólkur II:** *børn frá 9 til 11 ár, dreingir:*
Fríði Weihe Fríðmundsson
Jóhannes Jóannesson
Tóki Bjarnason Poulsen

**Bólkur II:** *børn frá 9 til 11 ár, gentir:*
Margit Weihe Fríðmundsdóttir

**Bólkur III:** *børn frá 12 til 14 ár, dreingir:*
Jóanis Albert Nielsen
Hjørtur Bjarnason Poulsen
Hjørtur Ellingsgaard
Niels Gilstein Midjord
5 Benjamin Thomassen

# Tveir unglingar til HM

**Magnus Andreasen og Nikkel Petersen úr Ørvi vera við, tá HM fyri ung í bogaskjóting verður í Turkalandi í næstu viku**

BOGASKJÓTING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hetta skrivar Bogaskjótideild Føroya á heimasíðu sínari.

Longu tíðliga seinasta vetur byrjaði miðvís venjing, har bestu skjúttarnir vórðu funnir, og tveir teirra, Magnus og Nikkel, hava nú skotið somikið væl, at teir lúka kravið, sum sett varð fyri at sleppa við til HM.

Skráin er fyribils, men verður farið úr Føroyum 3. oktober og heim aftur 13. oktober.

Fyrsta kappingardagin verður skotið á longstu frástøðunum og næsta dagin verður skotið á styttru frástøðunum. Samlaða úrslitið frá hesum báðum døgunum verður grundarlag fyri, hvussu skjúttarnir koma at dystast.

Alt eftir, hvussu nógvir skjúttar eru, verður loyvt í mesta lagi 128 skjúttum víðari úr hvørjum bólki.

Føroysku úttøkukrøvini vórðu sett eftir, hvussu nummar 32 stóð seg í HM fyri tveimum árum síðani, og tí verður vónað, at føroysku skjúttarnir eru við í fremra bólkinum av teimum 128, sum skjóta seg til finaluumførini.



*Magnus Andreasen og Nikkel Petersen fara í morgin til Turkalands, har teir taka lut í HM í bogaskjóting*
*Mynd: www.archery-fo.net*